# a oyggjaland


*Lagt til rættis:*
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Myndir:*
*Álvur Haraldsen*
*alvur@sosialurin.fo*




lagið í Miðvágs-Sandavágs havn. Í 18. parti hildu vit fram í Vágum við hinum bygdunum í oynni; Vatnsoyrum, Sørvági, Bø og Gásadali, meðan 19. partur var úr Sandoy og Skúvoy.

Í 20. parti vóru við í Rituvík, á Rituvíkshálsi og í Æðuvík. Rætt skal vera rætt. Hvørki í sjálvum bygdunum, Rituvík og Æðuvík, var nógv at síggja. Tí vóru flestu myndirnar av ídnaðarøkinum á Rituvíkshálsi. Í 21. parti vitjaðu vit grannabygdirnar, Nes og Toftir. Á Nesi var lítið at síggja, men hóast Nes kommuna fekk heiðursløn fyri best røkta vinnuøki, var ikki torført at fáa myndir av óruddi við havnarlagið á Toftum. Í 22. parti vóru vit í Runavík, Saltangará og Glyvrum, og heldur ikki har vóru trupulleikar at finna órudd.

Í 23. parti hildu vit fram norður eftir eystara armi á Skálafjørðinum við Lambareiði, Lamba, Søldarfirði og Skipanesi.

Myndirnar úr 24. parti vóru vit í Gøtu og Leirvík, har nóg mikið var at taka av, og tað er var tað eisini í Kambsdali og Fuglafirði, haðani myndirnar í 25. parti vóru frá. Í 26. parti hildu vit fram í Eysturoynni í bygdunum Elduvík, Oyndarfirði og Hellunum. Seinasti partur var á í Skálabotn og út eftir vestara armi á Skálafjørðinum til Skála.

Í dag flyta vit okkum út á Strendur.

Føroyar skal vera ferðamannaland, er vakra endamálið hjá bæði politikarum og myndugleikum, sum arbeiða við ferðavinnu. Í fjør kom stóra herðaklappið frá háttvirda tíðarritinum, National Geografic Traveler, sum setti Føroyar á eitt fyrstapláss av 111 oyggjalondum, tá tað snýr seg um at hava reint umhvørvi. Men liva vit upp til hetta? Og hvønn mátistokk hava tey fólkini brúkt, ið hava útnevnt oyggjar okkara til henda fornemma heiður? Hava hesi verið varug við tey túsundtals tonsini av burturkasti, sum sløðist runt allastaðni? Um so er, kann hetta valla hava talt við í grundarlagnum fyri metingini. Annars má standa ómetaliga illa til í øðrum oyggjalondum, sum eru á listanum hjá blaðnum. Tað var í øllum førum ikki torført at fáa eyga á óruddið ígjøgnum myndatól okkara.

Føroyar eru naknar og opnar, og tí sæst óruddið her nógvar ferðir betri, enn tað ger í londum, har trø og annar vøkstur kann fjala yvir ein stóran part. Nøkur vøkur sjón er hetta ikki, og fyri mong man tað tykjast óskiljandi, at fyritøkur, stovnar, kommunalir myndugleikar og onnur sleppa avstað við at seta gamlar maskinur, bilskrokkar, bingjur og annað burturkast frá sær á slíkan hátt. Ringast er við havnaløg, alistøðir, ídnaðarøki, bóndagarðar, jarðarbrúk og í niðurløgdum grótbrotum, har onki mark tykist vera fyri skilaloysinum. Og hvør hevur ábyrgdina av, at hetta kann lata seg gera? Tosað verður nógv um nýggjar brennistøðir, tí orkan er ov lítil, men hesar megna onki at gera við gamalt jarn. Tað má tyrvast ella flytast av landinum.

Ein glotti er, tí herferðin hjá Sosialinum tykist longu hava givið úrslit. Allur bati bøtur, og síðani blaðið fór í gongd við at vísa á órudd og burturkast, hava bæði Tórshavnar og Sunda kommunur álagt øllum at rudda upp á kommunalum vegum og økjum. Eisini hevur Klaksvíkar kommuna tikið stig til at rudda upp ymsastaðni.

Aftur í dag lata vit myndirnar tala, og tað halda vit fram við, til vit hava verið um alt landið.



















